# kkustað





Øll tóku hond í at rudda uppaftur. Heldur ikki kvinnurnar hildu seg aftur



Menn og kavarar frá Brimli vóru við til at rudda upp í bátahylinum



Tað var ikki steinur oman á steini, eftir at landnyrðingsódnin hevði verið í holt við aldargamla kirkjugarðin



Linjohn Christiansen vísti løgmanni og Marjuni Hanusardóttir runt í »ruinunum« við havnarlagið

Landsins hevur deild í kjallaranum hjá handlinum á Mølini.

Har greiddi eigarin av handlinum og umsitarin av Rúsuni á Sandoynni, Bjarni Dalsgaard, løgmanni frá, hvussu ótrúliga nógv brim hevði verið. Sum kunnugt brutu brotini bæði jarnhurðina uttaná og vanligu hurðina innan undir inn ígjøgnum við tí úrslitið, at størsti parturin av deildini fórst.

Har fleyt við øldunkum og plastfløskum um stóran part av havnarøkinum, og onkur helt skemtandi til, at summir sóust snara sær aftur um okkurt horni, meðan teir heltu høvdinum afturá.

## Aldargamal kirkjugarður farin

Úr Rúsuni var farið víðari eystur at hyggja at brimgarði og grótkasti. Tað var næstan óhugnaligt at ímynda sær tær aldur, sum høvdu skolað upp um bæði grótbrot og brimgarð, tí hetta virkaði so høgt.

Men brotið hevði upp um, tí ein meiri enn hundrað ára gamal kirkjugarður hevði so kent havsins megi á sær, at allur eystari partur var niðurrapaður, og partur av grótinum var slongdur heim móti Rúsuni, har eystari endi hevði mist so at siga allan klæðningin.

At enda var so farið oman í sjálvan bátahylin, har løgmaður eitt nú prátaði við manningina á Brimli, sum var komin suður at tøma hylin fyri »bátalík«.

Rundtúrurin endaði, har hann byrjaði, nevniliga í »undirhúsinum«, har borgarstjórin bjóðaði til borðs við alskyns góðbitum sum turrari grind, turrum fiski, eplum og spiki afturvið, umframt smyrjibreyði við góðum føroyskum viðskera sum skerpikjøti, rullupylsu og so sjálvandi egg og sild – sum eisini útsendu frá Sosialinum og Rás2 fingu loyvi at njóta.

Linjohn Christiansen nýtti høvið at takka løgmanni fyri at hann sýndi bygdini ta virðing at koma suður, fyri sjálvur at skoða skaðarnar. Og hann heitti samstundis á Jóannes Eidesgaard um at bera so í bandi, at landið fór at hjálpa til við at endurbyggja tað, sum skaðaódnin hevði brotið niður.

## Eingi lyfti

Eftir rundferðina fekk Rás2 orðið á løgmann og spurdi, hvussu tað bar til, at hann var farin suður til Skálavíkar at skoða skaðarnar við egnum eygum.

- Tað var fyrst og fremst tí eg helt, at tá ein bygd verður rakt so harðliga av ódnarveðri, sum Skálavík í hesum førinum hevur verið, var tað rætt at vísa skálvíkingum ta virðing at koma á staðið fyri at síggja, hvussu nógv hetta ódnarveðrið hevði gjørt um seg, segði løgmaður.

Sjálvur er hann vaksin upp við Trongisvágsfjørð, sum ikki er brimpláss, og tí hevði hann ilt við at ímynda sær, at uppgangur kann gera so stóran skaða, sum hann í Skálavík sjálvur var vitni til.

Men ætlar løgmaður so at hjálpa skálvíkingum fíggjarliga at endurbyggja skaðarnar?

- Tað mugu vit so hyggja nærri at. Tað hava vit als ikki tosað um í landsstýrinum, eg helt bara, at eg við egnum eygum skuldi kunna meg um støðuna, segði løgmaður við Rás2.

Og nøkurlunda tað sama endurtók hann, eftir at borgarstjórin í Skálavík hevði takkað honum fyri vitjanina. Men hann lovaði tó, at sambandið skuldi haldast og vísti á, at Landsverk hevði verið har suðuri og kanna skaðarnar, og at teir í næstu viku fóru at koma við einari meting av, hvat tað fór at kosta at gera eitt nú grótkastið aftur.

Men løgmaður endaði tó við hesum orðum:

- Sjálvandi má mann sum tað allarfyrsta tryggja sær, at tað, sum verjir bygdina, verður bygt upp aftur sum skjótast.

ART Listagluggin GALLERIE

Opið:
tý - frí : 15.00 - 17.30
ley : 11.00 - 14.00
Annars eftir nærri avtalu!

**Listagluggin sóknast eftir dygdargóðum listaverkum**

Í samband við komandi framsýning lýsa vit eftir listaverkum - eldri sum nýggjum - eftir viðurkendum listafólkum. Antin keypa vit listaverkini ella selja vit tey/tað fyri tygum.

Setið tygum í samband við okkum fyri at hoyra nærri.



Kári Svensson



Eyðun av Reyni



Tórbjørn Olsen

Listagluggin
Niels Finsensgøta 25, Tórshavn
Tlf. 322022 - 210022
e-mail: listagluggin@hotmail.com

Í løtuni hava vit framsýning við verkum eftir Andreas Andreassen, Bárður Jákupsson, Olivur við Neyst, Tórbjørn Olsen, Eyðun av Reyni og Kára Svensson.